


Javni sóknast eftir einum dugnaligum og røskum fólki í hálvtíðarstarv til skrivstovuna at byrja hálvan august ella eftir nærri avtalu.

**Vit leggja dent á fylgjandi førleikar:**
- gott yvirlit, dugir at arbeiða sjálvstøðugt og trívist við skiftandi arbeiðsuppgávum
- til alt vanligt skrivstovuarbeiði
- til at skipa og skráseta
- til at arbeiða við vanligum telduforritum
- til at samskifta í skrift og talu
- til at málbera seg væl og skriva rætt føroyskt

**Starvið er fjølbroytt, har tú m.a. fert:**
- At samskifta við økisfeløg, limir, myndugleikar og onnur
- menna mannagongdir á skrivstovuni
- umsita heimasíðu felagsins
- gera klárt til fundir o.a.

**Útbúgving ella arbeiðsroyndir**
Vit leita eftir dugnaligum fólki við skrivstovuútbúgving ella viðkomandi royndum innan skrivstovuarbeiði Eldhugi, hjálpsemi og forstáilsi fyri fólki, ið bera brek eru avgerandi neyðugir eginleikar.

**Lønin**
verður ásett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn og CV skulu sendast til:
Javni, Hoydalsvegur 40,
postmoga 1133,
110 Tórshavn.

Umsóknin skal vera Javna í hendi í seinasta lagi mándagin 5. Juli.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Sigrun Wardum, javni@javni.fo, tlf. 31 48 27.

Javni er felag, sum arbeiðir fyri góðum umstøðum til børn, ung,vaksin og eldri við menningartarni. Javni vil fegið hava eitt samfelag,har rúm er fyri øllum, og har øll kunnu hava eitt gott lív út frá egnum fortreytum og ynskjum.

javni – Virkin og virðismikil

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo · javni@javni.fo

# KLÆDNA ATSTØÐINGUR



## Klædnaatstøðingar

byrja á Tekniska Skúlanum í Tórshavn í august 2010

Útbúgvingin tekur 2 ár

Seinasta freist at søkja er 29. juni 2010

Ring á tlf 738050 og hoyr nærri

ella vitja heimasíðu okkara á www.tst.fo

**www.tst.fo**
– skapandi umhvørvi

Tekniski Skúlin í Tórshavn · Smiðjugerði 1
Postrúm 3239 · 110 Tórshavn

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

## SSP-SAMSKIPARI

**Á sosialu deild kommununnar er eitt fulltíðarstarv sum SSP-samskipari til barnaverndartænastuna leyst at søkja.**

SSP er ein tvørfaklig samstarvsskipan millum myndugleikar og stovnar, ið arbeiða við ella hava samband við børn og ung. Yvirskipað er endamálið at fyribyrgja kriminaliteti og skaðandi atburði millum børn og ung.

**ARBEIÐSØKI**
SSP-samskiparin hevur lyklaleiklut í øllum SSP-arbeiðinum í kommununi, sum er býtt í tríggjar økisbólkar. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um umsiting av økisbólkunum, at samskipa atgerðir, ið setast skulu í verk, og at fylgja hesum upp.

SSP-samskiparin virkar í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á deildini og aðrar viðkomandi samstarvspartnarar. Eisini kemur samskiparin í ávísan mun at arbeiða við barnaverndarmálum.

**VIT BJÓÐA**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv bæði fakliga og persónliga
- møguleika fyri at menna teg fakliga
- eina vælvirkandi deild, har strembað verður eftir, at arbeiðið verður gjørt á einum fakliga høgum støði

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur tey málsøkir, sum sambært galdandi lóggávu eru løgd til kommununa at umsita.

Á sosialu deild starvast 5 sosialráðgevarar, 3 skrivarar, ein sálarfrøðingur umframt deildarleiðari. Eisini er eitt toymi við 6 familjuráðgevum knýtt at deildini.

SSP-samskiparin skal verða útbúgvin sosialráðgevi.

**LØN OG SETANARVIÐURSKIFTI**
Lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**UMSÓKN**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 5. juli 2010. Merkið umsóknina „SSP-samskipari".

**MEIRI FÆST AT VITA**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

**Onnur størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Stuðulsfólk** – Barnaverndartænastan
Umsóknarfreist 05.07.2010

**Pedagogur** – Vøggustovan Reiðrið
Umsóknarfreist 05.07.2010

**Pedagogur** – Stella Maris Vøggustova
Umsóknarfreist 05.07.2010

**Pedagogar** – Býlingshúsið millum Gilja
Umsóknarfreist 05.07.2010

**Pedagogar** – Dagstovnin Kurl@
Umsóknarfreist 05.07.2010

**Pedagogur** – Býlingshúsið á Norðasta Horni
Umsóknarfreist 05.07.2010

**Pedagogur** – Dagstovnin við Botnánna
Umsóknarfreist 08.07.2010

**Løn og setanarviðurskifti** fyri pedagogar eru í samsvari við galdandi sáttmála millum Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER HØVUÐSSTAÐARKOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA